# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Realskúlagentur



Mynd frá "Realskúlaframsýningini 1916-66", sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í 2007. Her er ein mynd av gentum í Realskúlanum.

**Tær eru. f.v.:** Selma Haraldsen úr Fuglafirði, Bitten Finsen (dóttir Finsen telegrafstjóra), Jona Joensen (á Landavegnum), Elinborg Lützen, Olga ?, Vigga Chor, lærarinna, Lisa Christiansen, Thurid Kjølbro, Ester Lützen (g. Djurhuus), Tulla (dóttir Stengrim Winther), Elisabeth Olsen, Gunvør Dahl Christiansen, Nancy Petersen og Marianna Simonsen.

Um onkur hevur okkurt at viðmerkja ella hevur hug at ogna sær hesa myndina, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánjalsdóttir á telefon: 226024.

*(Mynd nr. 197).*

✝

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara kæri maður, pápi, abbi og langabbi

**Hjartvar Signar Poulsen**
Tórshavn

andaðist í heiminum 26. sept., 71 ára gamal.

Kistan fer úr heiminum í Kirkjugarðskapellið týsdagin 29. sept. kl. 18.00.
Jarðarferðin verður úr Kirkjugarðskapellinum mikudagin 30. sept. kl.14.00.

*Familjunnar vegna*
**Astrid**
**Laila, Bødvar, Edda, Brestir og Beinir v/fam.**

Tey, ið vilja minnast Hjartvar, kunnu lata Føroya Ríðingarfelag eina gávu, konta í peningastovnunum

## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu,tá mamma, vermamma, omma og langomma

**Birthe Helene Leo**

doyði og varð jarðað.

Takk fyri minnisgávur.

*Familjunnar vegna*
**Jensia, Niclas Pauli, Johan og Jóhannes**

### Prógv

Regitsa Johannesen, Froðba, fekk 4. juni 2009 prógv sum farmakonomur frá farmakonomskúlanum í Hillerød, Danmark. Læruplássið var Suðuroyar Apotek, Tvøroyri.

### Dagurin

28. september. Venselaus, deyður í 935. Sonur hertogan Vratislav í Bøhmerlandi. Av øvund læt heidni bróðirin Boleslav hann myrða. Gjørdist verndarhalgimenni hjá Bøhmen og er jarðaður í Sankta Vensils Kapelli í Vituskirkjuni í Prag, sum er bygd oman á toftunum av tí rotundu, hann sjálvur læt byggja. Føroyska navnið er Vensil. Hammersheimbættin kemur úr Bøhmerlandi, og Vensil próstur skrivaði navn sítt Venceslaus Ulricus Hammersheimb (1819-1909). Navnið er slaviskt og merkir hin heiðurkrýndi. Lucas Debes doyði hendan dagin í 1675, 52 ára gamal.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

## MERKISDAGAR

**60 ára føðingardagur**
Hósdagin 1. okt. verður Maria Blábjørg, Fuglafirði, 60 ár. Føðingardagurin verður hildin heima frá kl. 15. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**65 ára føðingardagur**
Fríggjadagin 02.10.2009 fyllir Kitty Gudmundsen í Vági 65 ár, føðingardagurin verður hildin í Billiardhúsinum frá kl 19. Øll er hjartaliga vælkomin.

**80 ára føðingardagur**
Fríggjadagin 2. okt. fyllir Johan Thomasen, Tvøroyri, 80 ár. Dagurin verður hildin 3. okt., frá kl. 15 í heiminum hjá Elin og John Thomasen.Fornarett 13. í Trongisvági. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**90 ára føðingardagur**
Mikudagin 30. sept. verður Hannemia Petersen, Runavík, 90 ár. Tey ið vilja heilsa uppá Hannemiu, eru vælkomin í Sjókafeina mikukvøldið kl. 18.

**90 ára føðingardagur**
Týsdagin 29. september fyllir Magnus Jacobsen úr Norðragøtu, búsitandi í Havn, 90 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 3. oktober saman við familjuni.

## Tøkk



Hjartaliga takki eg øllum tykkum, sum komu í Lonina at halda føðingardagin saman við mær og mínum, og annars øllum, sum mintust til mín á 90 ára føðingardegnum 22. aug.
Takk fyri gávur, blómur, yrkingar, talur, tónleik og góða hjálp.

**Alfred Klein**

Sosialurin